

*Barbara í Gongini frammanfyri súreplatræið í havanum í Rødovre, træið blómar bert í eina viku*
Mynd: Símun Jóanesarson

# Sermerkt snið til Føroyar

**Barbara í Gongini er ein tann føroyski sniðgevin, ið hevur gjørt mest vart við seg uttanlands. Í komandi viku verður høvi at uppliva sermerktu sniðini hjá Barbaru í Føroyum, vit hava hitt føroyska slóðbrótaran innan móta.**

MÓTI
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Týsdagin 15. og mikudagin 16. mai verður Hvonn karmur um sølusýning. Á sýningini verða snið úr kollektiónunum summar 07 og vetur 06 hjá Barbaru í Gongini umframt serlig sýnispløgg av ymiskum alagi, hjá føroyska sniðgevanum. Vit vóru framvið í Rødøvre, har Barbara búleikast og arbeiðir.

- Hetta fevnir um nýtt og gamalt ikki um nakað, sum er ov gamalt. Her verða eisini snið til komandi heyst og vetur kollektiónir, greiðir Barbara frá. Hennara vørur eru ikki at fáa í Føroyum, og tí er hetta ein forkunnugur møguleiki, hjá føroyingum at uppliva føroyska merkið, sum búleikast í Keypmannahavn.

- Eg havi ein lítlan keyparaskara í Føroyum frammanundan, ið plaga at ringja til mín. Men nú havi eg júst gjørt avtalu við Júnik, um at royna mítt merki, so tað fer skjótt at vera møguligt at keypa mínar vørur í Føroyum. Men tað er greitt, at henda framsýning hevur til endamáls, at vísa føroyingum, hvat eg takist við. Eg havi hildið fast í mínum uppruna, og havi altíð arbeitt við íblástri úr Føroyum, greiðir Barbara frá.

## Progressiva Barbara

Barbara er uttan samanbering, tað mest progressiva navnið á føroyska mótapallinum. Við sínum Avant Gardu sniðum hevur Barbara m.a. fingið atgongd til heimsins størstu mótaviku í París, har hon í fjør sýndi fram á Zipzone Gallery beint undir Eiffel torninum. Hetta gallaríið var karmur um nøkur av teimum mest progressivu og respekteraðu nøvnunum á mótavikuni millum onnur danan Jens Laugesen, ið fekk heiðursløn frá fronsku delegatiónini, sum týdningarmiklasti sniðgevi á mótavikuni.

Men fyri Barbaru var hetta møguliga síðsta ferðin á stóru messuni.

## Spennandi Rendezvous

- Eftir messuna í París mátti eg velja, um eg ætlaði at verða verandi saman við Laugesen og fínum nøvnum sum honum, ella um eg skuldi satsa uppá okkurt annað. Eg valdi so í ár ístaðin fyri almennu mótavikuna, at fara á Rendezvous, ið er ein nýggjari messa, har tey nýggju ungu altjóða nøvnini hittast. Hendan messan er fýra ferðir um árið, tvær ferðir við konufólkaklæðum og tvær ferðir við mannfólkaklæðum, greiður Barbara frá. Hon tykist heldur ikki í iva um, at hetta var rætta valið.

- Rendezvous er fyri meg heilt víst feitasta messan. Eg var har 1.-4. mars, og eg fekk nógv burturúr, eg kom inn á grikska og italska marknaðin, og eg fekk í lag eina framsýning í London.

Barbara í Gongini var ein av føroysku sniðgevunum, ið sýndi fram á Funky Faroe Islands í London í fjør, tá bar hon føroysku fyrireikarunum eina tøkk fyri, at teir høvdu sparka einar dyr upp fyri føroyskum sniðum á enska marknaðin. Um hetta á nakran hátt var orsøk til, at hon á Rendezvous hitti bretar, ið kendu merkið Barbara í Gongini, veit Barbara ikki. Men úrslitið av hesum møti var eitt tilboð um at koma til London í august, har hon skal hon sýna útvald pløgg fram í gallarínum og handlinum hjá japanska sniðgevanum Michiko Koshino á 59 Broadwick Street. Ein debut í Onglandi, sum tykist sera spennandi. Har skulu sniðini hjá Barbaru hanga saman við nøkrum av størstu mótaguruunum innan fyri hennara listagrein.

## Slóðbrótandi snið

Barbara arbeiðir við eini smalari linju til ein smalan málbólk, og hennara snið minna ofta meira um list enn um vanlig klæði. Hon er við øðrum orðum ein slóðbrótari, ið er við til at vísa vegin, ið meira vanligi mótin skal fara. Barbara er serliga kend fyri at binda og flætta ymisk tekstilir saman, og fyri ógvisliga háttin hon snollar sínum modellum, eitt nú vill hárstýling við balónum og pútum í hárunum.

## Vanlig snið frá Barbaru

Í Løtuni arbeiðir Barbara saman við einum starvsfelaga við eini nýggjari linju, ið væntandi fær heitið Regular, og sum er munandi meira vend at tí kommersiella.

Í hesum sambandi setur Barbara nú á stovn føroyskt felag og fer undir at søkja íleggjarar. Ferðin til Føroyar hevur tí eisini til endamáls at vekja áhuga millum føroyskar íleggjarar.

- Eg havi alliera meg við eina, sum er klekt á sama staði sum eg, og sum eg havi samstarvað við áður. Vit arbeiða við, hvussu vit kunnu kommersieliesera míni snið, og samstundis royna at halda fast í einum ávísum twisti, sigur Barbara.

Hetta er ein roynd, hjá Barbaru, at gera sína fyritøku sunnari, og at fáa fleiri pengar inn í hana. Men her liggja eisini listarlig áhugamál sum grund.

- Eg haldi, at tað er meiningsleyst, at vera í eini komersiellari vinnu sum mótavinnuni, uttan at koma í talu við nakran, bara at vera kunstnerisk. Sum tíðin frálíður, er eisini týdningarmikið, at virksemið glíður. Men samstundis er tað eisini týdningarmikið, at vit hava twistið, og at mongdin av twisti er tann heilt rætta, soleiðis, at vit ikki detta niður ímillum, greiður hon frá.

## Hitt Barbaru í Hvonn

Á sølusýningini á Hvonn verður tó snið av vanliga Avant garda slagnum at síggja. Sýningin er í døgunum 15. og 16. mai frá kl. 13.00 – 19.00. Móttøka verður, tá sýningin letur upp 15. mai kl 13.00. Á sølusýningini verður møguleiki at ogna sær kollektiónsroyndir og serlig sýnispløgg við 50 % í avsláttri. Barbara í Gongini verður at hitta, meðan sølusýningin er opin.



*Eitt av sniðunum úr Summar 07, ið Barbara fer at sýna fram á Hvonn*

FAKTA

### Merkið Barbara í Gongini

hevur sín upruna í tí avent garda. Hugtakið kemur av tí radikalu listini í Fraklandi í seinru helvt av 1900 talinum og merkir nýskapandi list. Mótin hevur tikið hugtakið til sín, og er tað innan hesar karmar at merkið Barbara í Gongini virkar.

Til ber at vitja Barbaru í Gongini á heimasíðuni www.barbaraigongini.dk

FAKTA

### Summar kollektión 07

hevur sum tilgongd knúta-tema. Temaði hevur sín uppruna í Føroyskum bindi-siði og er ein afturvendandi táttur í fabuleringini. Av nesum spretta sermerktar og til tíðir humoristiskar loysnir. Hesin teknikkur er vorðin eyðkenni fyri merkið "Barbara í Gongini" uttanlands.

### Vetrar kollektión 06

hevur sum tilgongd flatir í asymitri. Úr temanum verður hugsað snið í kvadratiskum modulum tað vil siga kjólar gjørdir úr kvadratiskum stykkum, og fleiri asymetrisk stykki í einum plaggi. Hetta er á at líta tveydimensionelt í formi.